

# Posta Stamps
Føroyar

Nr. 16
Apríl 2013

ISSN 1603-0036

Nordafar í Føroyingahavnini
List eftir Olivur við Neyst
Jólaevangeliið 1
Føroysk matlist á heimsmarknaðin

Posta
FAROE ISLANDS







Royndarprent

FO 769-771

# Nordafar í Føroyingahavnini

A/S Nordafar, sum føroyingar, danir og norðmenn stovnaðu í 1953, hevði stóra útgerðarstøð og framkomið flakavirki í Føroyingahavnini í Grønlandi. Síðani 1927 hevði Føroyingahavnin sunnan fyri Nuuk verið miðstøð fyri tí føroyska grønlandsflotanum.

Føroyingar bygdu smiðju, sjómansheim og sjúkrahús. Teir løgdu veiðu og útgerð upp á berar klettar, og stórir damparar komu eftir saltfiski at føra heim til turkingar ella til marknað. Í 1937 gjørdu danskir myndugleikar Føroyingahavnina til altjóða havn. Tá funnu serliga norðmenn sær pláss longur inni í fjørðinum.

Eftir seinna heimsbardaga vildu danir lata Grønland upp fyri fremmandum tjóðum eins og menna grønlendska samfelagið og vinnulívið. Kapprenning var millum føroyingar og norðmenn um at gera seg betur út uppi á landi. Løgtingið, fiskasølan og manningarfeløgini stovnaðu felagið L/F Grønlandsfelagið.

Hóast danskir myndugleikar høvdu ætlað, at bert ríkisborgarar skuldu fáa fótin fastan, eydnaðist norðmonnum at vera fyrr á sjóvarfallinum. Ein samanrenning av felagnum A/L Utrustning í Ålesund fór í 1949 gjøgnum lítla danska A/S Asgrico undir at byggja upp Asgricohavn innan fyri føroysku Føroyingahavnina.

Støðin varð skjótt útgjørd við bryggju, smiðju, saltgoymslu og oljutangum eins og vælferðarhúsi og vaskarii. Hon hevði úr at gera fyrstu árini, men skjótt kom stígur í, tí fiskivinnumynstrið broyttist.

L/F Grønlandsfelagið hevði ikki rættiliga fingið gongd á sínar virkisætlanir úti í Føroyingahavnini. Tó hevði felagið bygt ein handil nærhendis Sjómansheiminum. Skjótt strongdu norðmenn á at kasta saman við føroyingum. Í 1953 komu A/L Utrustning, L/F Grønlandsfelagið og A/S Asgrico ásamt um at stovna partafelagið Nordafar, sum tók alla støðina og hennara virksemi upp á seg.

Føroyskir handverkarar vóru í stórum tali har yviri í 1954 og bygdu bæði saltgoymslu og frystigoymslu inni í firðinum samstundis, sum norðmenn útbygdu eyðkendu træbryggjuna, sum danski staturin tók upp á seg.

Støðin mátti standa á fleiri beinum. Eitt var sjálv útgerðarstøðin, annað var at taka ímóti



saltfiskalastum til víðari avskipingar og triðja at taka ímóti og virka fisk frá útróðrarbátum. Føroyingar róðu longu fyri kríggið út úr Føroyingahavnini.

Frá 1954 gjørdi Nordafar eisini út sínar egnu Nordafarbátar. Fiskurin varð fyrru árini virkaður til saltfisk, men í 1959 var flakavirki stovnsett í Føroyingahavnini, og har tók seg upp ein týðandi flakavinna.

Nógv varð fiskað í Grønlandi í sekstiárunum. Fiskiflotarnir vóru stórir úr mongum londum. Stundum kom meir enn helmingurin av føroyska útflutningsvirðinum haðani. Hesi ár vóru upp í 2000 føroyingar árliga í Grønlandi við trolarum, línuskipum, skonnartum og útróðrarbátum.

Nordafar virkaði nógvan fisk, og skipaferðslan í Føroyingahavnini var almikil. Upp í 1000 mans kundu vera inni í senn, men brádliga hvarv toskurin í Grønlandi seinast í sekstiárunum. Fiskiflotarnir fóru á aðrar leiðir og støðin í Føroyingahavnini hevði ikki sama týdning longur.

Nakað av laksaveiðu tók seg upp, men hon varð skjótt bannað. Rækjuveiða úti á bankunum gjørdist eitt satt ævintýr í sjeytiárunum. Tá kom støðin hjá Nordafar til góða nyttu eitt skifti. Men teir bestu dagarnir vóru farnir.

Danir tóku seg úr A/S Nordafar í 1960. Í 1975 sluppu norðmenn sær burturúr, og nú sótu føroyingar við øllum partapeninginum, men við ongum føroyskum kvotum í Grønlandi frá síðst í sjeytiárunum og trupulleikum at fáa rávøru fekst ikki góður rakstur.

Føroyingar treiskaðust kortini í Føroyingahavnini. Vildu ikki sleppa endanum, um okkurt skuldi vísa seg. Seinasta árið, støðin bjóðaði seg fram, var 1984. Síðani var hon hildin við líka og mannað áttatiárini út, men tá tað miseydnaðist at fáa grønlendingar upp í felagið, avgjørdi Føroya landsstýri ikki at veðhalda longur.

Felagið fór á húsagang og varð í 1990 selt á tvingsilssølu. Ein týðandi kapittul í føroyskari vinnulívssøgu í 20. øld var liðugur.

*Jógvan Arge*










FO 772-773

Royndarprent

# List: Olivur við Neyst

Løtan sum kaleidoskopisk brot, sæð gjøgnum listamansins triðja eyga. Lívæðrasláttur í gandakendum sólgeislum, alsamt skiftandi, altíð á ferð – ein ævinlig kringla av løtum ið ongantíð koma aftur. Dragandi alheimur har fuglur og hugur flúgva sum shamanistiskir andar út í tað ókenda – á veingjum, á sjónum ella í hugmyndum ið barnið byggir um frásøgnina hjá tí vaksna.

Er hugflogið svart ella hvítt? Hvat takast menninir við á tí lítla bátinum? Dyrgja teir í sólsetri, ella eru teir kanska mýtiskar mentanarhetjur á sólskipinum, ið leggja frá landi í rísandi sól - út handan sjónarringin, roysni og brøgd at fremja?

Og hvat sigur vaksna fólkið barninum frá? Nøvnini á monnunum í bátinum? Søguni hjá bátinum? Ella er báturin í roynd og veru ein sinnismynd av søguni hjá tí vaksna?

Tjaee, hvør veit? Tað er ein sjálvsagdur rættur hjá listamanninum at blanda sjónárin við hugferð, til okkum at gruna um. At leggja eitt næstan mýtiskt avrit av veruleikanum fram, sum fær okkum at venda aftur og aftur til júst hesa løtuna, har vit ikki vóru til staðar, men tó halda okkum kenna. Ein sansaleikur ið ongantíð gevur eitt endaligt svar. Ein mynd ið sigur ymiskar søgur til ymisk fólk til ymsar tíðir.

Og so, uttan víðari, broytist leikpallurin. Frá tí gyltu løtuni millum alt og onki, til larmin og lívið við Vestaru vág. Angin av tara og diesel, risastórir jarnbjølgar ið gnadda móti gummidekkunum á kajuni. Ein vælkend mynd fyri okkum ið vuksu upp við hesum klondyke-kenda umhvørvinum.

Og tó. Sóu vit nakrantíð endurskin av fjarum fiskileiðum í opnu hekkuni á trolarunum? Rustreyðar formar í skiftandi bláum bylgjum? Sóu vit nakrantíð fjølbroytta árinið av mannaávum speglast á vánni?



"Vestaravág", 1989
Olivur við Neyst

Neyvan. Tað vit síggja er eitt sansaligt hugnám, ið analytiski listamaðurin leggur fram fyri okkum. Vit hyggja tann vegin hann vil at vit skulu hyggja – og fáur megnar tað kynstrið betur enn Olivur við Neyst. Hansara ansur fyri løtuni er undranarverdur og gávan at endurgeva margfaldið í asymetriskum strokum og litum, lyftir tað gerandisliga upp í ein næstan mýtiskan alheim. Skjøldrar, skipslutir, stákan á kajuni og fólkameldur, skapa lív í fragmenteraðu heildini, ið stundum virkar nær um kubistisk.

Olivur við Neyst varð borin í heim í Klaksvík í 1953. Longu sum blaðungur fór hann undir at mála og sýna fram – og longu frá byrjan var greitt, at hann var gávuríkur sum fáur. Í 1975 gjørdist hann næmingur á kunstakademinum í Keypmannahavn og varð vandur í málningalist av so mætum listamonnum sum Richard Winther og Wilhelm Freddie. Frá 1979 til 81 gekk hann á listanámsligu linjuni hjá Helge Betram.

Í áttatiárunum flutti Olivur við Neyst aftur til Føroya og etableraði seg í Tórshavn saman við øðrum ungum og framfýsnum listamonnum sum t.d. Torbjørn Olsen og Amariel Norðoy. Hetta ættarliðið flutti mørkini í føroyskari myndlist frá tí stundum dapra og tunga til tað litríka og margfalda.

Evnisheimurin hjá Olivur við Neyst er serliga býarumhvørvið og mannaheimurin - men eisini frábrigdi í náttúruni finst í hansara litfagra myndaheimi. Olivur fæst eisini við akvarellmáling og hevur gjørt hópin av bókamyndum úr føroyska umhvørvinum.

Listafrímerkini í ár sýna tvey dømi um myndaheimin hjá Olivur við Neyst, “Sólskin” frá 1987 og “Vestaravág” frá 1989.

*Anker Eli Petersen*










FO 774-775

Royndarprent

# Jólaevangeliið 1

**Rúm fyri gleðiboðskapinum?**

**"Og hon átti son sín, hin frumborna, og sveipaði Hann og legði Hann í krubbu; tí ikki var rúm fyri teimum í gistihúsinum."** Soleiðis endar læknin Lukas frásøgnina um lagnuferð Mariu og Jósefs úr Nazaret í Galilea til Betlehems í Judea at lata seg skriva í manntal eftir boði Augustusar keisara.

Jólafrímerkini við súmbolsku myndunum hjá Edwardi Fuglø av Jesu føðing ímynda saman við tekstinum ein djúpan menniskjaligan og eksistentiellan veruleika – longsilin eftir rættvísi, friði og gleði á lívsferðini gjøgnum ein órættvísan, ófriðarligan og ótryggan heim.

Lukas leggur í tekstinum dent á, at nú er nakað heilt nýtt við at henda, sum ikki er rúm fyri í mannasøguni, men sum kortini fer at broyta heimssøguna. Rúmið er ikki bara ítøkiliga húsarúmið, men eisini sálarliga og andaliga rúmið í huga menniskjunnar.

**Hvat var nú tað nýggja, sum mannahugsan hevði so ilt við at rúma?**

At nú skuldi tað ómøguliga henda – at hin almáttugi skapari himins og jarðar skuldi trína fram sum menniskja undir somu korum sum tann líðandi og leitandi mannaættin fyri at leiða hvørt menniskja fram til rættvísi, frið og gleði í ríki Guds. Hetta samsvaraði við djúpa longsilin eftir meining og samljóði í tilveruni, tí eins og nýføðingurin tystir eftir mjólk og samskifti, leingist menniskjanum eftir meining og samljóði. Skapanarsøgan sigur okkum eisini, at menniskjan varð skapt til tey fýra samljóðini – samljóð við næstan, samljóð við seg sjálva, samljóð við náttúruna og samljóð við Gud skaparan. Hesi samljóð var menniskjan sett at verja og varða um.

Kortini er søga okkara sum mannaætt merkt av, at samljóðini eru vorðin óljóð, sum upplivast sum meiningsloysi, tómleiki, órættvísi og líðing.





Tá skip eru í havsneyð og um at søkka, er tað skiparans ábyrgd fyrst at royna at bjarga ferðafólki, síðan manning og síðst sær sjálvum. Um neyðugt má hann lata lív fyri fyrst at bjarga øðrum, áðrenn hann hugsar um seg sjálvan.

Líknandi samhuga síggja vit á nýggju jólafrímerkjunum: at almáttugi skaparin ikki himprast at hugsa um sín skapning og at festa búgv millum tey fátækastu fyri at bjarga mannaættini – einasta rúm var í einum fjósi, tí ikki var rúm fyri honum í gistihúsinum. At enda doyði hann á krossi, tí ikki var rúm fyri honum hvørki í samfelagnum ella í mannahjørtum – alt fyri at bjarga øðrum við at ofra seg sjálvan.

Tá eingilin Gabriel boðaði Mariu og Jósefi frá, at hon skuldi vera móðir hansara, sum skuldi bera navnið Jesus, tí hann skuldi bjarga mannaættini frá órættvísi, óttaðust tey. Og tá hann nú eisini skuldi verða kallaður Immanuel, sum merkti, at hann skuldi liva hjá og saman við hvørjum fátækum og neyðstøddum menniskja, var hesin boðskapur ov stórur at rúma. Men tá Maria fekk at vita, at onki er Gudi ómøguligt, segði hon lýðin: "Eg eri tænastukvinna Harrans" og gav gleðiboðskapinum rúm: "Tykkum er í dag Frelsari føddur, sum er Kristus, Harrin, í staði Dávids".

Tað var ikki so løgið, at hesin boðskapur var torførur at rúma, tí Jóhannes ápostul sigur okkum, at hetta vóru eisini tíðindini um, at "Orðið", sum var í upphavi og var hjá Gudi og var Gud, nú skuldi skína sum ljós í myrkrinum. Hetta var Logosorðið, tann skapandi, intelligenti mátturin, sum alt var vorðið til við, og sum áhaldandi helt øllum alheiminum uppi.

**Var rúm fyri skapandi Orðinum?**

Vit lesa: "Hann kom til sítt egna, men hansara egnu tóku ikki ímóti honum. Men so mongum sum tóku ímóti honum, gav hann mátt at verða børn Guds - teimum, ið trúgva á navn hansara". Maria segði tó: "...





andi mín gleðist í Gudi, Frelsara mínum... tí hann hevur sæð til tænastukvinnu sína, sum so lítið hevur at týða...". Hon gav nýggja, slóðbrótandi frelsaranum rúm.

Edward Fuglø megnar meistarliga stig fyri stig í myndum at geva gleðiboðskapinum rúm – bæði húsarúm og hjartarúm. Samstundis lýsir hann spenningin í gongdini, tá Guds máttur úr erva trínur inn á jarðarpallin við síni nýskapan.

Á fyrstu myndini sæst, at rúm fyri gleðiboðskapinum bert er í einum fjósi millum húsdjórini. Úr rúmdini í erva heldur stjørnan á at lýsa eisini gjøgnum lítla gluggan í fjósinum og boðar frá tí nýggja og guddómliga veruleikanum. Stavurin og stigin standa hvør sínu megin fjósið og kveikja vón um nýggja leið framá og uppeftir.

Á næstu myndini hevur Jósef tikið stavin í hond, og fevnandi við arminum um herðar Mariu er hann nú tilreiðar at leiða familju sína fram gjøgnum lívið – í samljóði við sína konu og sín skapara, tí framvegis lýsir stjørnan í erva leiðina fram. **Maria og Jósef undrast á, at hin Alvaldi hevur tikið bústað millum menniskju.**

**Hetta er enn undranarverdi jólaboðskapurin: at Guds gevandi og uppofrandi kærleiki kann fáa innivist og hjartarúm hjá hvørjum einstøkum menniskja.**

*Róland í Skorini*










# Vakrasta frímerkið 2012

Frímerkjasavnarar kring allan heim hava atkvøtt millum føroysku frímerkini, ið vórðu givin út í 2012 og úrslitið gjørdist hetta:

Nr. 1 gjørdist annað Europa-frímerkið, FO 734. Hetta er ein fotomynd av Trøllanesi, sum Eyðbjørn Jacobsen hevur tikið.

Nr. 2 gjørdist frímerkið av gorfuglinum, FO 729, sum Astrid Andreasen hevur teknað.

Nr. 3 gjørdist frímerkjaarkið "Regin smiður", FO 739-744, sum Anker Eli Petersen hevur sniðgivið.

Hepnu vinnararnir eru:

1) Gávukort á 2.000,- kr.:
Hanna K. Møller, Eiði

2) Árbókin 2012:
Magdalena Johannesen,
Tórshavn

3) Ársmappur 2011:
Ada í Líð, Tórshavn
Jan Rubeksen, Tórshavn
Birna Dahl, Tórshavn
Elisa Simonsen, Kollafjørður
Vár Fossdal Sjóðklett, Tórshavn

Vit ynskja vinnarunum til lukku og takka fyri luttøkuna.


Leif Sørensen, kokkur á KOKS


Bókin "KOKS"

# Føroysk matlist á heimsmarknaðin

Føroysk matmentan hevur ikki altíð verið so uppfinnsom, tí leingi snúði hon seg bara um at eta seg mettan. Men hetta er farið at broytast, og orsøkin er fyrst og fremst, at kokkurin Leif Sørensen við sínum listargávum hevur flutt føroyska matgerð inn í ein nýggjan heim.

Hesin nýggi heimurin verður lagdur fram í bókaverkinum KOKS, sum stjórin á Hotel Føroyum, Johannes Jensen, hevur tikið stig til saman við Leif Sørensen. Bókin er 270 blaðsíður til støddar og prýdd við serstakliga vøkrum myndum av mati, náttúru, veiði-fólkum, djórum og kokkum.

Kendi danski matummælarin, Bent Christensen, hevur skrivað meginpartin av tekstinum í bókini, og flestu myndirnar hevur matfotografurin, Claes Bech-Poulsen, tikið. Fororðini skrivaði René Redzepi, ið eigur heimsins bestu matstovu, Noma. Hann kennir væl Leif Sørensen.

"Eg hitti Leif á fyrsta sinni í nítiárunum. Vit stóðu báðir í kokkalæru, og eg spurdi hann, hví hann ikki var heima og fekk sína lærutíð har. Hann snaraði sær seigliga ímóti mær við einum álvarsomum eygnabrá og segði, at matstovur, ið seta smakk og handverk hægri enn stórar máltíðir fyri bíligan pening, vóru ikki til í Føroyum," sigur René Redzepi.

**Til allan heimin**

Leif Sørensen kundi sagt Føroyum farvæl og verið verandi uttanlands, men setti sær heldur fyri at broyta konservativu føroysku mathugsanina og læt í 2005 upp matstovuna Gourmet í Havn. Hon er afturlatin nú, men við henni prógvaði hann, at matur er ikki bara metta. Matur er list og smakkur, og rávørugrundarlagið í føroysku náttúruni er nærum óavmarkað.

Nú er Leif Sørensen leiðari á KOKS á Hotel Føroyum, har hann eltir somu slóð sum í Gourmet. Við tí altíð nýhugsandi stjóranum á hotellinum, Johannesi Jensen, hevur



Turrfiskakips og turr toskaskræða
Mynd: Claes Bech-Poulsen

hann fingið rætta mannin aftrat sær at fáa sagt søguna um burturkrógvaða føroyska rávøruparadísið.

"Í nýggju bókini vilja vit siga søguna um náttúruna, veiðimentanina og rávørurnar í Føroyum, og hvussu einastandandi matur kann fáast burtur úr teimum. Maturin, sum gjørdur verður á KOKS, byggir á føroyska siðvenju, og ræsti smakkurin gongur nógv aftur," sigur Johannes Jensen.

Danskir ummælarar hava fyri stuttum kosið KOKS at vera millum 17 tær bestu matstovurnar av teimum 13.000 í kongaríkinum. Eitt norðurlendskt lið av ummælarum hevur sett KOKS á 51. pláss yvir 66 tær bestu norðurlendsku matstovurnar. Johannes Jensen hevur góðar vónir um, at KOKS røkkur longri.

"Vit kunnu gerast heimsins besta matstovu, tí í Føroyum hava vit heimsins bestu rávøru. Í veruleikanum eru Føroyar ógvuliga serstakar. Vit kunnu kalla okkum norðurlendska Hawaii, um vit vilja. Hetta sigi eg, tí øll, ið vitja her, gerast bæði ovfarin og bergtikin av føroysku náttúruni. Søguna um mentanina og rávørurnar eiga vit at selja um allan heim," sigur Johannes Jensen.

### Íkast í ferðavinnu

Johannes Jensen ivast ikki í, at søgan um leskiligu rávørurnar í føroysku náttúruni kann fáa fleiri ferðafólk til Føroya. Hann vísir á, at á Bornholm vitja 600.000 ferðafólk hvørt ár, meðan í Føroyum eru bara 40.000. Hetta kemst av, at so fá vita, hvussu serligar Føroyar eru, heldur hann.

"Sjálvandi er lætt at pástanda, at vit hava heimsins bestu rávøru og so bara endurtaka hetta allastaðni. Men hetta er veruliga so," undirstrikar Johannes Jensen. "Best merkir, at vit hava tann besta smakkin, besta fastleikan, besta luktin og bestu útsjóndina. So góð er rávøran í Føroyum, at ein kokkur kann bara gera matin verri, fer hann ikki rætt



Rættur úr "KOKS": Rogn - súrrómi - leykur
Mynd: Claes Bech-Poulsen

fram," sigur hann.

Hetta veit Leif Sørensen. Hann er matlistarliga skaldið, sum ger alt við umhugsni, og fagurfrøðiliga umhugsin er hann sum fáur. Bara fyri eygað eru rættirnir, hann borðreiðir við, ein fragd, men alt, hann ger, er torført. Hann leitar út á ókendar leiðir, tá hann skal finna nýggj hugskot og nýggja ráværu. Granskar í onkrum urtagarði ella í haganum.

"Hann er meira enn nakar annar eyðmjúkar ímóti siðvenjuni. Hann hevur eitt opið sinni fyri nýggjum innstøkkum og setir treytaleys krøv til dygd. Við einum skapandi framráki letur hann sítt yrkisliga grundaða handverk menna seg listarliga á ein hátt, ið einans tey fáu megna," skrivar Bent Christensen m.a. um kokkin á KOKS í nýggju bókini.

*Uni Arge*

Leggjast kann afturat, at matstovan KOKS á Hotel Føroyum er vorðin prenomineráð til Ársins Matstovu 2013 saman við eitt nú NOMA í Danmark, ið áður er kosin at vera heimsins besta matstova.

Tað er redaktiónin á Den danske Spiseguide 2014, sum hevur valt 10 matstovur burturúr. Grundarlagið fyri útnevningini er, at allar hesar matstovur hava ment seg og eru á høgum støði, bæði gastronominskt, og hvat viðvíkur drykkjuvørum.

Seinast í juni verða fimm av matstovunum valdar frá, og at enda verður ein av matstovunum kosin Ársins Matstova 2013. Vinnarin verður funnin á gallakvøldi hjá Den danske Spiseguide sunnudagin, 27. oktober 2013.




Snøgga Nordafarmappan við smáørkunum úr Føroyum og Grønlandi.
Kann bíleggjast á bíleggingarlepanum og á www.stamps.fo

# Slóðbrótandi frímerki við AR-kotu

Frímerkaarkið Nordafar, sum kemur út í september, hevur ein heilt serligan eginleika, sum ikki áður er sæddur á føroyskum frímerkjum.

Á tí mittasta frímerkinum í arkinum er ein goymd sonevnd AR-kota. AR stendur fyri *Augmented Reality*. Um tú skannar frímerkið við tíni snildfon ella teldli, aktiverast AR-kotan og ein filmur um Nordafar verður vístur.

Hetta er ein stuttfilmur, sum lýsir tíðina, tá Nordafar var í besta blóma og hvussu tað sær út í dag.

Fyri at síggja filmin er neyðugt, at taka niður eina ókeypis app. Meira fæst at vita um hesa áhugaverdu ætlan í komandi blað og eisini á heimasíðuni www.stamps.fo sum fráliður.


















Royndarprent

# Postgjaldsmerki 2013: Trølla Pætur

Tann 1. oktober verða fýra nýggj postgjaldsmerki givin út. Hetta er sætta árið á rað, at føroysk postgjaldsmerki verða givin út.

Myndevni í ár er Trølla Pætur, sum bæði stór og smá kenna, og hevur Eyðbjørn Jacobsen tikið myndirnar.

**Øll kenna Trølla Pætur**

Tað var um aldarskiftið, at Trølla Pætur kom oman av føroysku fjøllinum. Og frá fyrsta degi hevur hann bergtikið barnahjartað.

Trøllið við morreyða hárinum og nýggju høvdunum dámar væl at syngja, og saman við garvillu Trølla Ommuni, sum spælir uppá nærum øll ljóðføri, hava tey bæði framført og undirhildið víða hvar til gaman fyri børn og barnsligar sálir.

Øll kenna Trølla Pætur og Trølla Ommuna. Síðani ár 2000 hava trøllini innspælt fimm filmar og útgivið tríggjar fløgur. Tey hava verið í nógvum vasi og oftani hava tey havt teir báðar løgreglumenninar, Erling og Jógvan, aftaná sær. Ikki tí, onki ilt býr í Trølla Pæturi, og innast inni er hann einans eitt góðvarið og fitt trøll. Trølla Omman er meira kúllaslig og dugir ikki so lætt at skilja mun ímillum, hvat er rætt og hvat er skeivt.

At nærum øll børn elska Trølla Pætur og Trølla Ommuna er ikki so løgið. Eftir øllum at døma eru tey hvørki óhugnalig ella vandamikil. Trøllini hava gott barnatekki og umboða tey flest allar eginleikar, sum børnini kenna frá sær sjálvum. Trølla Pætur kann verða bæði stúrin og ræddur, men næstu løtuna er hann ovurfegin, dansar og er lættur um sinnið. Omman torir hinvegin alt. Hon er djørv og treisk sum fáur. Hon koyrir risastórar last-







Trølla Pætur og omman í húsinum
Myndir: Eyðbjørn Jacobsen

bilar, stýrir veldigum skipum og flýgur bæði tyrlur og flogfør. Trølla Pætur hevur gingið nakað í skúla og dugir eitt sindur at rokna og lesa, meðan Trølla Omman, sum heldur seg vita alt, hvørki dugir at lesa ella rokna.

Vit kunnu vera púra vís í, at glómur er í barnaeygum, tá ið trøllini trína fram á pallin. Og onki er so spennandi, sum aftaná eina passaliga villa og festliga konsert, at sleppa at heilsa ein góðsligan Trølla Pætur og ta herligu og barnavinarligu Trølla Ommuna.

So ábyrgdarleys og samvitskufull, sum nú einaferð trøll kunnu verða, hevur hetta ólíka og hugtakandi parið upptraðkað, dansað og sungið fyri nærum øllum smábørnum í Føroyum, men sanniliga eisini vitjað og fingið hjartaliga móttøku í Danmark, Íslandi og Grønlandi.

Vit kunnu vænta bæði eitt og annað, har Trølla Pætur og Trølla Omman eru í leiki, men gott er at kortini vita, at alt plagar at enda í øllum góðum.

*Steintór Rasmussen*

Vitjið heimsíðuna hjá Trølla Pætur her:
www.tp.fo

Til ber at bíleggja stemplað og óstemplað postgjaldsmerki við fyrstadagsstempli ella vanligum dagstempli. Eisini fæst ein fyrstadagsbjálvi við øllum fýra postgjaldsmerkjum á.

Sum kundi og frímerkjasavnari kannst tú sjálv/ur áseta virðið á postgjaldsmerkjunum. Tó kann ásetta virðið ikki vera lægri enn 7,00 kr. og ikki hægri enn 100,00 kr. Hetta fæst bert við eyka bílegging og er ikki umfatað av haldinum.

# Nýggjar frímerkjaútgávur - 23. september 2013




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Nordafar** |
| Útgávudagur: | 23.09.2013 |
| Virði: | 3 x 9,00 kr. |
| Nummur: | FO 769-771 |
| Frímerkjastødd: | 42 x 27,55 mm |
| Arkstødd: | 165 x 60 mm |
| Tekningar: | Martin Mörck |
| Prentháttur: | Offset + intaglio |
| Prentsmiðja: | Joh. Enschedé, Holland |
| Postgjaldsbólkur: | Miðalbrøv innanoyggja, 0 - 50 g |




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **List: Olivur við Neyst** |
| Útgávudagur: | 23.09.2013 |
| Virði: | 19,00 & 38,00 kr. |
| Nummur: | FO 772-773 |
| Frímerkjastødd: | 28,8 x 36,8 mm |
| Málningar: | Olivur við Neyst |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | LM Group, Canada |
| Postgjaldsbólkur: | Miðalbrøv innanoyggja og stórbrøv til Evropa, 101-250 g |




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Jólaevangeliið 1** |
| Útgávudagur: | 23.09.2013 |
| Virði: | 7,00 & 12,50 kr. |
| Nummur: | FO 774-775 |
| Frímerkjastødd: | 26,44 x 42,0 mm |
| Lagt til rættis: | Edward Fuglø |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | LM-Group, Kanada |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv innanoyggja og til Evropa, 0-50 g |




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Postgjaldsmerki 2013: Trølla Pætur** |
| Útgávudagur: | 01.10.2013 |
| Virði: | 7,00 kr. - 100,00 kr. |
| Frímerkjastødd: | 22,5 x 55,0 mm |
| Myndir: | Eyðbjørn Jacobsen |
| Prentháttur: | Flexoprent |
| Prentsmiðja: | |

Framsíðumynd: Claes Bech-Poulsen
Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

Find us on Facebook